# Argir mugu nú á breddan

**Jógvan Arge**
*býráðslimur í Havn*



Tað var hugaligt at vera til samkomu í Kollafirði hendan dagin, ítróttarhøllin hjá kollfirðingum varð innilokað. Eitt stórt ynski hjá kollfirðingum í sambandi við samanleggingina við Havnina er nærum uppfylt.

Kollfirðingar sjálvir hava gjørt sítt til, at høllin verður so trivalig. Fyri ikki at enda við einum skravaðum modelli, hava teir tikið seg saman at gera ein part av arbeiðnum sjálvir. Tað er alla æru vert og tænir øðrum sum fyrimynd.

Samstundis er kommunan farin undir nýtíðargerð og víðkan av skúlanum í Kollafirði.

So langt so gott.

Men áðrenn Kollafjørður kom upp í Havnina, kom hin grannakommunan Argir uppí. Gamaní undir eitt sindur øðrvísi umstøðum, men tó sum ein javnbjóðis partur av kommununi.

Har hevur ikki verið sama ferð á vælvildini. Tíðin er farin frá Argja Skúla. Hann stendur at bresta og er ikki førur fyri at hýsa tí vaksandi næmingatalinum.

Hesin skúlin er í heilum koyrdur aftur um í raðið, men skal tað ikki í longdini ganga út yvir skúlagongdina, er tíðin komin at raðfesta hann í fremstu røð.

Argjafólk leggja doyin á ítróttavirksemi. Vit síggja, at Argja Róð-rarfelag áhaldandi er millum tey sterkastu í landinum, og Argja Bóltfelag tekur seg støðugt fram bæði við kvinnum og monnum.

Tað er væl skiljandi, at argjafólk eisini vilja hava møguleikar fyri at íðka innandura ítrótt eins hoyvíkingar hava fingið og kollfirðingar liggja fyri at fáa. .

Tí eigur spurningurin um at byggja eina ítróttarhøll við fótbóltsvøllin á Argjum at verða settur á breddan sum skjótast.

Tað hevði gjørt stóran mun á Argjum og hevði lætt um heimi í Havn.

## VIÐMERKINGAR

# Hvat hava vágbingar fingið afturfyri ta risastóru skuld, Vágs kommuna hevur

**Petur S. Johannesen**

Nú haldi eg at tað er uppá tíðina at vit taka tingini í rættari rekkjufylgju her í Vági, her hugsi ikki um samanlegging av kommunum, men um arbeiðspláss í Vági, eg havi lýst mína støðu í bløðnum fyrr, hvat eg haldi um samanlegging av kommunum í Suðuroy.

Eg havi fleiri ferðir skrivað um, hvussu neyðugt tað er at fáa nøkur arbeiðspláss til bygdina, og her hava vit ein møguleiki fyri at fáa uml. 40 -50 arbeiðspláss til bygdina og ikki 35 arb. pláss, sum sagt er frá fyrr, tí vit skulu taka barsilsfarloyvi og sjúkralegur og annað við, samt aðrar tænastur, sum eru tengdar at einum røktarheimi.

Eg vil afturvísa at ein miðnámsskúli er ein dynamo fyri Vágsbygd, nei álvaratos, hetta má verða skemt, sum Dennis Holm, samfelagsfrøðingur, førir fram í grein síni, arbeiðspláss er fyrsta liðið til at skapa trivna og dynamikk í Vági, og Vágs kommuna hevur verið sera passiv til at verða við til at fáa trygg og áhugaverd arbeiðspláss til bygdina alla mína tíð, men tvørturímóti eru almenn arbeiðspáss flutt av bygdini, til dømis Toll- & Skatt stovan er flutt á Tvøroyrar.

Hóast kommunan ikki hevur gjørt íløgur í skip, virkir osv, so hevur kommunan kortini eina **risa stóra skuld** at dragast við, skattatrýstið er í topp, vegakervið ovarlaga í bygdini er í sorli, ikki nøktandi tilføring av drekkivatn til tey ovastu húsini í bygdini osv, eg standi spyrjandi, **hvat eru pengarnir nýttir til** og hvar stavar ovurhondsstóra skuldin frá, kann kommunan ella onkur annar svara uppá hetta, eg veit at nógv undrast yvir hetta, viðmerkjast skal at Tvøroyri hevur enn størri skuld, men har hevur kommunan verið við til at keypt skip og flakavirki í mun til Vág sum ikki hevur gjørt íløgur av slíkum slag.

Vit vanligi borgarin, mugu finna útav at verða meiri kritisk, og fylgja við hvat tær fáu skattakrónurnar, ið inn koma, verða brúktar til, eg havi hoyrt at VBsamtaki - nýggi vøllurin og tilhoyrandi liðuggerð, hevur kostað tað hvíta út av eygunum, kanska vit kunnu fáa at vita um hetta er so ella ikki?

Vit hava ikki ein nøktandi dagstovn, men bert eina forkølaða loysn, aðrar bygdir á støðd við Vág hava fyri nógvum árum síðani bygt dagstovn, sum lýkur nútímans krøv, men sum siðvenja er, velur Vágs kommuna nógv ár eftir at td. Tvøroyri fekk dagstovn, eina forkølaða loysn, so sigast kann, at vit í Vági eru ikki forvand.

PALM Seafood P/F, sum er í svárari kreppu, fekk ikki strikað grundleigu skuld sína hjá kommununi, fíggjarnevndin hevur einmælt samtykt ikki at strika hesa upphædd, upphæddin var uml. 17.000 kr. Eisini eri eg vitandi um, at okkurt virki á keiini hevur fingið rykkjara eftir grundleigu frá kommununi, og um ikki verður goldið, verður upphæddin send til innheintingar. Er tað soleiðis kommunan prioriterar, ella eru tað aðrar orsøkir til tess.

Ein spurningur, sum nú reisir seg í kjalarvørrinum av hesum er, um kommunan hevur heimild til at innkrevja grundleigu, tí mær vitandi hava teir ikki yvirtikið strandrættindini enn, kanska kommunan kann greiða nærri frá hesum, og um strandrættigheitirnar ikki eru yvirtiknar, hevur kommunan ikki heimild til at krevja grundleigu á keiøkinum, har PALM Seafood liggur. Viðmerkjast skal, tá ið Polarfrost bleiv bygt, tá blivu ognararnir í bygdini eftirspurdir skriftliga, men sum sagt, meini eg ikki at strandrættigheitirnar eru yvirtiknar av kommununi. Hetta eru rímiligar stórar upphæddir, kommunan dregur inn ár aftaná ár, hetta kann kommunan greiða okkum frá.

Kunnu størv í umsitingini sparast, td. við umleggingum? Er tað neyðugt at hava so nógva funktionella arbeiðsmegi? Hvat við at bjóða flest øll arbeiði út? Hesir og ivaleyst nógvar aðrar spurningar má kommunan taka upp nú, tí lønirnar eru ein tungur partur av rakstrinum. Nú er tíð til at endavenda øllum rakstrinum og aktivitetunum hjá kommununi sum heild, og slagorið má verða "sparast skal har sparast kann" so vit fáa sum mest burturúr hvørjari skattakrónu, og hugsast má fyrst og fremst um at fáa arbeiðspláss til bygdina, sum ikki eru kommunal, og harvið fáa goldið ta ovurhondsstóru kommunalu skuldina aftur, so borgarin kann fáa okkurt gott aftur fyri sínar skattakrónur, og kommunan kann fara at virka sum endamálið er við eini kommunu.

Eftir at grundtørvirnir eru nøktaðir, so sum íbúð/hús - matur - hiti - el - klæðir osv, nústaðni tá, eg endurtaki nústaðni tá, byrjar man at hugsa um mentan og annan trivnað, vil eg minna Dennis Holm, samfelagsfrøðing, á, og tá ið einki arbeiði er, er tað burturvið at tosa um nakað annað, **enn hendan setning "hvussu fáa vit arbeiðspláss til bygdina"**

Tá ið kommunan nú hevur havnað tilboðnum frá landsstýrinum um røktarheim, tað koma kanska 2-3 arbeiðspláss afturat í miðnámsskúlan, so hevur hon tikið ta støðu, at vit hava ráð til at vraka tilboðið frá landsstýrinum, og harvið átekur kommunan sær at fáa onnur arbeiðspláss til bygdina, hvussu ætla tit at gera tað? Tí sjálvt um nakað av avbygdarfólki hevði komið at arbeitt á einum røktarheimi, so verða tað nógvir vágbingar, sum eisini høvdu fingið arbeiði har, hesar skattakrónur hevur kommunan ikki ráð til at vraka, vildi eg mett. Um so er, er kravið, at kommunuskatturin verður munandi minkaður.

Tað er nú blivin ábyrgdin hjá kommununi at tryggja okkum nøkur almenn/vinnulig arbeiðspláss, og vónandi kann kommunan fáa útlendskar íleggjarar til bygdina, so vit kunnu fáa fjølbroyt arbeiði aftur her, um hetta miseydnast, so meti eg, at um 20-30 ár er bygdin so skerd fyri ungfólk, at tað vendist ikki aftur, tí er tað mín áheitan á kommununa, at kommunan setur alt inn fyri at fáa íleggjarar at virka her. Eg vil vísa til grein, eg havi skrivað fyrr um hetta málið, lat okkum royna at berja okkum burtur úr tí ringa umdøminum, Vágs bygd hevur fingið í Føroyum. Vit vilja ikki verða ein byrða og eitt skendsorð fyri restina av landinum, og tí mugu vit gera nakað munagott sjálv á tí vinnuliga økinum.

Vónandi fái eg svar uppá teir spurningar í settir eru í hesi grein.

Ps. Mentan er góð, men vit kunnu ikki liva av henni.

# Hvussu fáa vit vøkstur?

**Marjus Dam**



Størsta politiska avbjóðingin fyrr, nú ein og framyvir er hvussu vit í Føroyum fáa vøkstur í samfelagnum.

Geografiskt liggja vit soleiðis fyri, at fiskiveiða altíð fer at vera ein av stóru vinnum okkara.

Hvat kunnu vit gera, fyri at sleppa undan at vera eitt primert ráv\u00f8ru framleiðandi land?. Tað er ikki undarligt at arbeiðsloysi veksur støðugt, tá ein størri og størri partur av okkara fiskivørum verður útfluttur óviðgjørdur. Arbeiði verður útflutt, og vit skaffa okkum sjálvum kappingarneytar. Vit geva teimum fiskin, ið skal kappast við okkara egna fisk.

Nøgdin er eftir 3 -4 árum vaksin frá 9000 tonsum til eini 32000 tons av fiski.

Hetta er ein stórur politiskur, vinnuligur og samfelagsligur trupulleiki.

- Er orsøkin til hesa skeivu gongd manglandi kappingarførið?
- Tørvandi marknaðartilgongd.?
- Er orsøkin ov gomul skip ella ov gomul flakavirkir?
- Er orsøkin, at vit hava sovið í tímanum?

Hugsa vit um eitt útlendskt slaktarí, so verður í flestu førum alt djórið skorið sundur til steikir, pylsur, súltur o.a. Onki, ella allarminsti parturin, verður tveitt burtur.

Hyggja vit eftir hvussu ein føroyskur seyður verður hagreiddur, so verður fyri stóran part krovið turkað – og restin tveitt burtur.

Mær tykir at sama mynd sum er við slakti av føroyska seyðinum er ein mynd uppá føroyska fiskavirking – stórt sæð.

Fiskurin verður keyptur við høvdi og sporli. Fyrst verða innvølir tveittir burtur. Síðan verður ein triðingur skorin burtur, nevniliga høvdi. Síðan verður ryggur skorin burtur, kílaskorið og at enda verður skræðan tikin av.

Og har á borðinum liggur eitt lítið óviðgjørt flakapetti. Hetta verður so pakka niður í stórari nøgd, fryst, og sent av landinum – har tann dýra virðisøkingin síðan fer fram.

Vit undrast á, at tað ikki ber til. Í fleiri førum undran ein meiri á, at tað bar til.

Hví skulu vit til keypmannin at keypa innflutta livur í dós fyri 140 kr/kilo, tá vit kasta hetta tilfeingi burtur. Tað sum aðrarstaðir gevur ivirskotið í framleiðsluni, er burturkast hjá okkum. Ein kann spyrja hvussu føroysk fiskivinna kann bera seg, tá meginparturin av tilfeinginum verður blaka burtur. Í fleiri førum ímóti gjaldi.

Eg trúgvi, at her er nógv í kann gerast. Millum annað má nýhugsan, gransking, og økt marknaðartilgongd til.

Hugskotini koma sjálvandi frá vinnuni sjálvari. Men ein uppgávan verður at leggja rammurnar, so at hugsanir, nýhugsanir og samskipan verður fólki og landi at gagni. Og so mugu vit ikki selja ella lata vitanina gleppa okkum av hondum fyri onki. Tað er hent í alt ov stóran mun.

Sera nógv er at gera, bæði politiskt og vinnuligt, so at virðisøkingin av okkara tilfeingi fer fram her á landi – til kappingarførar prísir. So at arbeiðsloysi minkar og flakavirkini gerast til peningamaskinur í okkara samfelagi. Tað eru tey ikki, um tey eru afturlatin.



## VIÐMERKINGAR

# Er homosexualitetur etandi?

**Tórbjørn Jacobsen**



Fekk túsund pund av bankahøvdum frá vinmonnunum yviri á Hulki, á Vaðhorn, fyri kortum. Skar nakað av teimum í kjálkar og loypti teir í pottinum ígjárkvøldið. Lakasaltaða spikið úr bíggjargrindini, fyrr í summar, fór í halaferðini á vælpolstraðu høvdunum niður ígjøgnum vælindini. Høgligt og rationelt at fáa sær mettuna, ímeðan lurtað verður eftir útvarpstíðindunum. Ikki óvæntað vóru høvuðstíðindini, at homosexuali-teturin í Føroyum hevði ein trupulleika. Ein av krossfararunum í stríðnum, Høgni Hoydal, var fortørnaður um, at landsstýrismaðurin í innlendismálum, og harvið eisini í løgmálum, Jógvan við Keldu, ikki vildi leggja uppskotið um skrásett parlag fram á ting, soleiðis at málið kundi lýsast út í æsir, og at tey homosexuellu eftirsíðani kundu fáa tann rættin sum tilkemur minnilutum í øllum siviliseraðum samfeløgum. Eftir at formaður Tjóðveldisfloksins var samrøddur, kundi útvarpið staðfesta, at formaðurin í Friðarboganum, Mia Wenningsted, kjálkaði økslina uppat okkara fræga formanni og var minst líka so fortørnað, sum hann, um allan tann órætt, ið skolaði oman yvir tey av sama kyni, sum í einum og øllum ynsktu at liva saman, á sama hátt sum heterosexuel sambond.

Í kvøld varð lagt frá landi aftur. Menuin var nú tvøstið úr somu bíggjargrind. Og hann náði meg um útvarpstíðindini ikki aftur í kvøld júkaðu uppí saman aftur um tað ringu lagnu, sum hendan samgongan, við Jógvani við Keldu á odda, hevði varpað tey homosexuellu úti í. Tað var um tað lagið, at felliknívurin gleið av í sneiðingini í seigu hvøljuni.

Eftir at lýsið var tváðað av fingrunum, varð eitt rend gjørt út í eina kvøldarkrambúð. Vár. Keypti Sosialin. Og nú líktist tað meira eini yvirdosis av homosexualiteti.

Hesin Høgni Hoydal, frontkemparin fyri homosexualiteti í Føroyum, og sum varð samrøddur í útvarpinum í fyrrakvøldið, sigur í samrøðu við Edvard Joensen, at sama málið hjá honum sum landsstýrismanni í 1999, líkist ikki tí hjá Jógvani við Keldu ídag.

Vónandi er hann skeivt endurgivin. Um ikki, so er hetta heimsmetið í manipulatión og tann stórsta lygnin, sum higartil dags er serverað føroyingum.

Alt hetta málið, um familjurættarligu lóggávuna, var uppi og vendi í 1999. Málið er tó eldri enn tað. Landsstýrið, við Maritu Petersen, sálu, á odda, heitti nevniliga á donsku ríkismyndugleikarnar um at øll hendan lóggávan var dagførd, hetta hendi longu á vári í 1993.

Síðani hendi onki fyrrenn landsstýrismaðurin í sjálvstýrismálum, Høgni Hoydal, tók aftur í aftur. Nú verður sagt í samrøðuni, at talan var um at yvirtaka málsøkið, tað er ein loddrøtt lygn, sum fyrrverandi landsstýrismaðurin má royna seg onkra aðrastaðni við, enn yvirfyri góða minninum hjá føroyska fólkinum. Hansara ætlanir vóru ongantíð aðrar enn at koyra ríkislógartilmælini á familjurættarøkinum ígjøgnum. Tvs. at dagføra donsku lóggávuna, sum frammanundan var galdandi. Sum eitt neyðaregg burturúr hesum pakkanum legði hann 5. mars 1999 uppskot til ríkislógartilmæli um at seta í gildi fyri Føroyar "Anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om ægteskabs indgåelse og opløsning." á tingborð.

Øll hini ríkislógartilmælini í familjurættarpakkanum hevði hann pilkað burturúr. Kristian Magnussen og undirritaði spurdu av tingsins røðarapalli, tá ið hetta uppskotið var til fyrstu viðgerðar, hvarið málið um skrásetta parlagið var blivið av. Sjálvandi vistu vit, hvussu stóra umsorgan landsstýrismaðurin hevði yvirfyri teimum homosexuellu og teirra rættindum. Landsstýrismaðurin var týðuliga ørkymlaður. Av realpolit-iskum og valdspolitiskum orsøkum hevði hann skvisað hendan partin úr familjurættarliga pakkanum, fyri at fullveldissamgongan kundi halda fram, maðurin sum skuldi leiða føroysku tjóðina inn í tann føroyska statin kundi av góðum grundum ikki lata eina sovorðna bagatell knúsa dreymin um tær frælsu Føroyar.

Nú er Jógvan við Keldu farin undir at dagføra ein annan part av hesum sama pakka. Hann velur eisini at skvisa hendan partin, og orsøkin er effinett hin sama sum hjá Høgna á sinni, hendan samgongan skal ikki syndrast orsakað av rættindunum hjá teimum homosexuellu.

Soleiðis handla tveir realpolitikkarar. Hetta er maktin í einum nøturhylki. Onki odiøst. Soleiðis er hin politiski heimurin nú einaferð samanskrúvaður. So vítt er spennið haðani og til andstøðupolitikkaran, ið onkursvegna letst at umboða allýsingina av øllum málum. Bara ikki tá ið hann sjálvur situr við valdinum.

Seinri kom málið fram aftur, um at yvirtaka málsøkið. Fleiri ár seinri. Men tá var Miðflokkurin tikin inn í gløðandi varman, og við teimum sum parlamentariskum grundarlagi visti man, at hetta bara var ein av nógvum gassballónum, ið vóru sendar upp, bara fyri at vera punkteraðar.

Sjálvandi skula allir minnilutabólkar hava tey neyðugu rættindini fyri at liva og virka javnbjóðis øllum øðrum í tí føroyska samfelagnum. Tað eigur og skal eisini bera til, at skifta orð um øll mál á Føroya Løgtingi. Eisini um rættindini hjá teimum homosexuellu, men harfrá og at misnýta tey í einum óreinum politiskum spæli, tað er at fara út um alt mark.

Høgni Hoydal og Jógvan við Keldu eru tvær ælin av sama vaðmali í hesum máli. Báðir valdu av realpolitiskum orsøkum at skekla rættindini hjá teimum samkyntu burturúr lóggávuarbeiðnum, og harvið fekk løgtingið ongantíð høvið til at viðgerða málið.

Tað er ikki eiti á fokus sum er á hesum málinum í løtuni. Løgmaður royndi at tiltuska sær apuna í Grasagarði, men nú man formaður Tjóðveldisfloksins vera farin avstað við drunninum. Og fremmandafólk, ið kanska skilja eitt vet av føroyskum máli, spyrja helst seg sjálvi, um Føroyar burturav eru ein koloni av homosexuellum individum nú tað ikki ber til at opna eina avís tíansheldur at lurta eftir útvarpinum uttan at hesi minnilutaviðurskifti verða viðgjørd. Høvuðsvinna, mentan, sosialir trupulleikar o.a. er horvið í einum køvandi skýggi, hevur ongan relevans í mun til hetta, og sum ein granni spurdi ídag, man homosexualitetur vera etandi? Nú útvarpið hevur valt at borðreiða við hesum ingrediensinum á menuiini hvørt einasta Guðs skapta kvøld?

Hetta er ikki skrivað ímóti nøkrum, eittans fyri, at tann rætti søguligi samanhangurin skal vera intaktur. Loddrættar lygnir eiga at vera afturvístar og rættaðar, soleiðis at eftirkomararnir og teir sum einaferð fara at granska í skrivaðu keldunum ikki fara skeivir av tí sum veruliga hendi. Í hesum viðfanginum kendist tað løgið, at formaðurin í blaðmannafelagnum, sum gjørdi samrøðuna í Sosialinum, skuldi vera so púrgjørdur í søguligari vitan um, hvussu leikur er farin handan politisku leiktjøldini, táið rættindini hjá teimum samkyndu hava verið viðgjørd hesi seinastu árini. Eitt gallarí av søgureingjan og politiskari manipulatión var ikki akkurát tað man hevði roknað við frá einum kandidati úr journalistiska jørðildinum íkring Danmarks Journalistiske Højskole í Áarósa.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

# Til Tórshavnar kommunu!

**Mikkalina Norðberg**

Trivnaðarstjórin hjá Tórshavnar kommunu sigur í lesarabrævi í seinastu viku við Dagstovnin í Hoyvík m.a.:

- At barnagarðsaldurin ikki er niðursettur frá 3 1/2 til 2 1/2, men bert 3 mánaðir.
- At kommunan vil rinda tað, tað kostar, at byggja og reka ein góðan dagstovn.
- At kommunan framhaldandi vil tryggja børnum, foreldrum og starvsfólkum eina vælvirkandi barnaansingarskipan, sum skapar trivnað og menning.

Eisini sigur trivnaðarstjórin, at vit í Havnini hava betri starvsfólkanormering á dagstovnunum enn fleiri av okkara grannalondum. Hetta er ikki eitt nøktandi fakligt argument í sær sjálvum fyri at lækka aldursmarkið til barnagarðspláss við 3 mánaðum.

Meira vil eg ikki blanda meg í skrivingina millum Dagstovnin í Hoyvík og trivnaðarstjóran, men gera viðmerkingar til oman fyrinevndu punktir og seta spurningar til trivnaðarstjóran og pedagogiska samskiparan í Tórshavnar kommunu.

Mítt endamál við hesum skrivi er at gera vart við, at lækkingin við 3 mánaðum til barnagarðspláss slítur upp á starvsfólkaorkuna í barnagørðunum. Tað hevur við sær, at tað pedagogiska støðið lækkar, og íseinasta enda gongur tað út yvir trivnaðin og menningina hjá børnunum.

Lækkingin av aldursmarkinum við 3 mánaðum til eitt barnagarðspláss merkir í veruleikanum, at nú skulu barnagarðarnir taka ímóti børnum heilt niður í 2 1/2 ár.

Vanliga byrjar eitt barn í barnagarði um summarið. Nú barnagarðsaldurin er lækkaður 3 mánaðar, t.v.s. barnið skal fylla 3 ár áðrenn 1. Januar árið eftir – ja, so eru nøkur børn bert 2 1/2 ár, tá tey fáa bjóðað eitt barnagarðspláss hjá Tórshavnar kommunu.

Barnagarðslívið er alt ov ógvusligt fyri 2 1/2 ára gamla barnið. Verðin blívur ov stór í mun til tað, tey kunnu yvirskoða. 3 mánaðir í einum vaksnamannalívi er einki, men sera nógv í einum barnalívi.

Menningin hjá børnunum frá 2 1/2 til 3 ár er sera umfatandi og hevur stóra ávirkan á hvussu barnið mennist framyvir.

Skal menningin blíva góð, krevur tað nærleika og eina trygga vaksna leiðandi hond. Børn undir 3 ár hava brúk fyri munandi meira enn starvsfólkaorkan í barnagørðunum røkkur til.

Sum pedagogur í barnagarði veit eg, at gera vit ikki arbeiði gott í dag, er trivnaður, menningin og gleðin við barnagarðslívinum minni /verri í morgin. Men starvsfólkanormeringin á barnagørðunum var ásett eftir, at børnini vóru umleið 3 ár, tá tey byrjaðu. Við teim minnu børnunum á stovnunum streingja vit á ein dag fyri og annan eftir. Úrslitið verður, at tíðarneyð og vantandi orka stýra, hvussu starvsfólkini leggja dagin til rættis – ikki tørvurin hjá børnunum.

Dagurin hjá børnunum í barnagørðunum kann skjótt blíva: Ringur trivnaður og nógvur grátur fyri at blíva hoyrd og sædd av starvsfólkunum í hesi alt ov stóru barnagarðsverð. Hetta er tað, Tórshavnar kommuna er í ferð við at bjóða teim 2 1/2 ára gomlu børnunum og teirra foreldrum í barnagørðunum.

Tað er sólarklárt, at í tí løtu Tórshavnar kommuna lækkar barnagarðsaldurin, lækkar starvsfólkaorkan og sum fylgja av hesum eisini tað pedagogiska støðið.

Her er ikki talan um framhaldandi trivnað, menning ella góðar stovnar, hvørki fyri børn, foreldur ella starvsfólk. Her er talan um ein »penan« bíðilista og politiskan/økonomiskan trivnað hjá Tórshavnar kommunu.

Mínir spurningar til trivnaðarstjóran og pedagogiska samskiparan hjá Tórshavnar kommunu eru so hesir:

- Hvat er fakliga argumentið fyri at seta barnagarðsaldurin niður við 3 mánaðum?
- Hvussu hugsa tit hesa broyting barninum at frama?